## VIÐMERKINGAR

# Ein atkvøða til mín er ein atkvøða til Tvøroyri

**Sverre Midjord**


VAL04

Fyrst fari eg at takka fyri tann stuðul, ið eg fekk til seinasta býráðsval, og ikki at gloyma løgtingsval. Eg eri takksamur, ikki er møguligt at takka hvørjum einstøkum, tí valini eru loynilig.

Men tey vísa, at tað arbeiði, ið eg havi gjørt gjøgnum árini, verður viðurkent.

Eg eri tvøramaður við stórum T. Tað skal ongin ivi vera um. Tað verður ført fram, at Sverre er ov gamal. Tað er so, at árini kunnu vit ikki renna frá. Tað var ein sending í sjónvarpinum, sum bleiv kallað »Den gamle«. Ein persónligheit, sum í sínum arbeiði sum kriminal-maður uppkláraði og greiddi torførar fløkjur.

Um skoðsmálið hjá teimum, ið kalla tann gamla ella gamli Sverre eru vend soleiðis, so taki eg tað ikki persónliga, tá er tað eitt kompliment.

Eg havi verið býráðslimur síðan 1962. Fyrst sum eykalimur og seinni sum fastur limur og havi soleiðis verið við at mynda viðurskiftini á Tvøroyri í mong ár. Og havi soleiðis sitið í býráðnum saman við nógvum góðum borgarum. Og eg havi onki persónligt útistandandi við tey mongu, sum eg havi samstarv við.

Tey seinastu 8 árini hevur verið eitt gott samstarv, soleiðis sum tað eigur at vera. Fyri 6 árum síðan avgjørdi eitt samt býráð, eftir tilmæli frá fíggjarnevndini, at vit skuldu fara undir niðurgjaldan av stóru skuldini hjá býráðnum. Og tað er gjørt soleiðis, at býráðið, ið tekur við, fær víðar ræsir fíggjarliga. Tað er goldið meira enn 50 milliónir. Hetta hevur sjálvandi ført við sær, at sitandi býráð ikki hevur havt stórt rásarúm, men tað komandi fær tað, soleiðis at nú kunnu tey, ið verða vald, gera meira til gagns fyri borgaran í okkara kommunu.

Tað fyrsta verður at fáa greiðu á sambýlis viðurskiftunum og farið kann verða undir at greiða hesi átrokandi viðurskifti. Tekningar og tað, sum krevst, er klárt.

Eg eri ikki samdur við samstarvsmanni mínum Finnleifi, tá hann á tí ítróttarliga økinum sigur, at vit hava ikki ráð. Um rætt verður borið at, so hava vit tað. Vit kunnu ikki bara lata standa til. Tí eri eg fyri, at nú verður farið undir at fyrireika bygging av svimjihøll og at gera eitt stadion til fótbóltin.

Eg havi ikki øll árini, eg havi verið býráðslimur, latið meg velja í býráðið fyri at fáa nakað frá býráðnum, men heldur at býráðið skal gera brúk av mær fyri at fremja tiltøk, og sum løgtingslimur fari eg at vera býráðsins forlongdi armur. Og uppá landsplan verður okkara sjúkrahús eitt mál, ið eg fari at verja. Eg havi fingið váttan fyri, at vit fáa eina nýggja rønku í ár, og onnur útgerð skal eisini fáast til vega. Somuleiðis skulu tey fíggjarligu viðurskiftini hjá okkara sjúkrahúsi førast á hædd við tað, ið Landssjúkrahúsið og Klaksvíkar Sjúkrahús fáa.

Ein atkvøða til mín er ein atkvøða til Tvøroyri.

# Vínnumál

**Sigurð S. Simonsen**
*Valevni á lista B*


VAL04

Góðu Fuglfirðingar!

Grundleggjandi politikkurin hjá okkum á borgaralistunum hevur verðið og vil framhaldandi verða, at veita vinnuni so góðar umstøður og karmar sum gjørligt, so hon megnar at halda uppi eitt høgt livi- og vælferðarstøði fyri allar borgarar.

Henda staðfesting og sannføring bar við sær eitt sera tætt samskifti og samstarv við vinnuumhvørvi í býnum. Avrátt var frá byrjan, at hava regluligar sokallaðar óformellar fundir ímillum vinnuna og býráðið.

Hesir fundir hava verðið sera vælumtóktir av teimum uml. 20 virkjum/fyritøkum ið hava luttikið.

At tað er neyðugt at taka lógvatak saman, fyri at varveita og økja um tey uml. 600 arbeiðsplássini sum eru í kommunini, er ongin yvi um.

Til hetta krevst ikki bert ein góður vilji frá kommununar síðu, men eisini førleiki og evnir at styra. Úrslitini tala fyri seg og vil eg nevna nøkur dømi.

**Dømi 1.**
Hagtølini vísa at Fuglafjarðar havn er ein av størstu uppskipingarhavnum av fiski og fiskavørum í Evropa. Í fjør vóru uppskipaði 350.000 tons av ráfiski og frystum fiska-vørum. Um olja o.a. verður lagt afturat kemur samlaða nøgdin av uppskipaðum vørum upp á 415.000 tons.

Avskipaði vóru 85.000 tons av fiskamjøli, lýsi, alifóðuri, frystum vørum og olju. Tað vil siga, at heili 500.000 tons fóru um kajkantin í 2003.

Hetta stóra virksemi setur sera stór krøv til havnalagið og eru nýttar uml. 35 mió. kr. til íløgur og rakstur tey seinastu 4 árini. Umframt hettar kemur mjølkajin sum Havsbrún hevur bygt (uml. 10 mió.).

**Dømi 2.**
Í samband við virksemi hjá Bergfrost, hava teir bygt ein virkisbygning. Hesin bygningur hevði ikki veri bygdur um kommunan ikki hevði avgjørt at byggja eina marknaðareftirlitstøð (BIB-støð). Ein tílikt støð kann nýtast av øllum, men er serliga hent tá tað ræður um triðjalanda fisk. Bert tvær aðrar BIB-støðir eru í Føroyum.

**Dømi 3.**
Timburhandilin á Kambsdali byggir í løtuni nýggjan handilsbygning á ídnaðarøkinum á Kambsdali. Hesin hevði ikki komið her uttan kommunan keypti gamla bygningin og lendið (12000 kvadratmetrar).

Ætlanin er at nýta bygning og lendið til al-mennyttug endamál, so sum næmingaheim o.a.

**Dømi 4.**
Timburhandilin í Fuglafirði ætlar eisini at byggja og í tí sambandi stóð Piddasahandil/Ribarhús fyri falli. Kommunan avgjørdi at keypa Piddasahandil og harvið verður ein tann mest varðveitingar verdugi og siðsøguligi bygningur varðveittur. Bygningurin kann nú halda áframm at verða karmur um eitt fjølbroytt og mentunarligt virksemi, trivnaðinum í býinum at bata.

Timburhandilin kann nú byggja sín nýggja hand-ilsbygning har í nánd.

**Dømi 5.**
Í samband við breiðkan av vegnum frá Gjógvará til Havnalagið hevði kommunan ætlanir um at seta pening av á fíggjarættlanini fyri 2005, til keyp av bakarínum (Breymolin) til niðurrívingar. Men bakaríið kom í fíggjarligar trupulleikar í fjør summar og óttin fyri at bakaraútgerðin var flutt úr bygdini var ítøkiligur. Kommunan framskundaði keypið og fekk bygningin fyri ein sámuligan prís. Bakarin leigar nú til annað pláss er funnið at býggja nýtt á.

Nóg mikið á hesum sinni, men omanfyrinevndu dømir vísa, at sitandi byráð hevur ført ein miðvísan og virknan vinnulívspolitikk og hevur harvið tryggja borgarnum eina framhaldandi góða tænastu, samstundis sum nógv góð arbeiðspláss eru varðveitt.

Sum útlitini eru, verður tað óivað størsta avbjóðingin hjá nýggja býráðnum at røkja tann leiklutin sum nátturliga er kommununar partur. Tað er at skapa karmar, umstøður og loysnir, soleiðis at vinnan verður eggja til at varðveita og skapa nýtt virksemi í kommununi. Hetta er lívsneyðugt.

# »Nolsinger kan man lide på!«

**Heðin Mortensen**
*býráðslimur*


VAL04

Kendu orðini úr Grindavísuni hjá Christian Pløyen eru longu dyggiliga staðfest so mangan, men ikki minst hetta síðsta árið, nú Nólsoyar kommuna og aðrar hava samráðst við Tórshavnar kommunu um samanlegging.

Nólsoyingar hava víst dirvi undir hesum samráðingum, og teirra partur hevur ikki ligið eftir. Men so mikið størri er ábyrgdin hjá okkum í høvuðsstaðnum, nú vit hava bundið okkum til at gera kommunurnar saman betri førar fyri at veita borgarunum betri tænastur.

Sjálvur var eg við til samráðingarnar um samanlegging, ið ikki minst bygdu á, at umráðandi var at hugsa um framtíðina, tá átøk skuldu gerast í Nólsoy. Og ikki minst var dentur lagdur á, at øll kommunal arbeiði, sum eru í gongd í kommununi nú, skulu fullførast.

Longu nú er skjøtil settur á barnagarð fyri umleið átta milliónir krónur, ið skal hava pláss fyri umleið 30 børnum, og somuleiðis verður farið undir ein útstykkingarveg fyri góða hálva millión. Nevnast kann í sambandi við barnagarðin, at har verða bæði vøggustova, barnagarður og høli til frítíðarskúla.

**Fulla fótbóltsvøll**
Ítróttarliga hava nólsoyingar á fleiri økjum megnað nógv, og umstøður verða eisini gjørdar fyri, at teir kunnu megna enn meira. Farið er undir fótbólts- og ítróttarvøll á Mýruni, og skal hesin vøllur hava fulla støðd og graslíki, so hann kann brúkast til góðkendar dystir.

Vit kunnu bara hugsa okkum, hvørjir møguleikar eru í hesum. Hví ikki eitt brak millum HB og B36 á hesum vølli á Ovastevnuni? Ella kanska NÍF kann bjóða øðrum av í avgerandi dysti har?

Teir nólsoyingar, ið kanska halda seg vera ov nógv til aldurs komnar til at fara í holt við fótbólt, eru heldur ikki gloymdir. Skipað verður nýggj umlætting fyri eldri við samlingsstaði, har øll kunnu koma at stytta sær stundir, nakað sum vit kenna tað frá Tilhaldinum.

Kann somuleiðis upplýsa, at Tórshavnar kommuna fer at keypa hús í bygdini, sum skulu geva umstøður fyri læknaviðtaluhøli, umframt høli til tannlækna og heimasjúkrasystir.

Trivnaðurin hevur stóran týdning fyri lívið í eini bygd sum Nólsoy, og her hugsi eg ikki minst um mentanina, ið av sonnum hevur verið eitt av »vørumerkjunum« hjá nólsoyingum. Umstøðurnar til mentanarligt virksemi eru ikki nøktandi, og tí eigur kommunan at hava ein virknan leiklut í at skapa karmar og møguleikar, so mentanarlívið í Nólsoy kann mennast enn meira.

**Álit gevur álit**
Nógvir virknir og livandi felagsskapir eru í Nólsoy, og vit mugu bara ásanna orðini hjá Pløyen enn eina ferð: »Nolsinger kan man lide på, de tiden ej monne spilde«.

Nú ræður um, at Tórshavnar kommuna ger sína skyldu ordiliga og røkir væl tað, sum er undirskrivað í samanleggingarsáttmálanu m. Vit onnur mugu jú royna ikki at standa aftan fyri nólsoyingar, men eisini at vera til at líta á!

Hesum vil eg arbeiða fyri, og tí vóni og ynski eg, at nólsoyingar eisini geva stuðul til at halda fram við tí arbeiði, skjøtil er settur á, so Nólsoyar bygd kann gerast ein blómandi og framkomin partur av høvuðsstaðarkommununi!



## VIÐMERKINGAR

# Progressivur kommunuskattur?

**Jan Poulsen**
*Valevnið Javnaðarfloksins til Tórshavnar Býráð*

Tá nú fleiri og fleiri mál verða løgd út til kommunurnar, frá landinum, at umsita, so hevur tað sjálvandi við sær, at tað verður meiri at gjalda fyri kommunurnar, og harvið borgararnar. Hetta merkir fyri borgaran, at tað skal gjaldast meira í skatti, eittnú við, at skattaprosentið fer upp.

Landsskatturin er progressivur, tvs. at tær breiðastu herðarnar berða tær tyngstu byrðarnar, sum eisini er tað rætta.

Kommunuskatturin er hinvegin ikki progressivur, soleiðis at tað ger tað sama hvør inntøkan er, so er skattaprosentið tað sama.

Tað er góður Javnaðarpolitikkur, at tey lægst løntu í hesum samfelagnum skulu hava eins góð kor sum øll onnur, og er tað tí av allstórum týdningi, at tað ikki verða lagdar fleiri byrðar á tey lægstløntu, tí tey klára illa nokk at svara hvørjum sær sum tað er nú.

Tí haldi eg, at tað hevði verið rætt, um kommunuskatturin eisini var progressivur, soleiðis at tær breiðastu herðarnar bóru tær tyngstu byrðarnar.

Tað er sjálvandi léttari hjá einum persóni sum hevur eina høga inntøku at gjalda meira til samfelagið, heldur enn at fara og knokkroyta ein skallutan mann ella kvinnu, eittnú eina flakakvinnu, sum kanska bert forvinnur sær 60.000 kr um árið í løn.

Tað er ikki meira enn rímuligt, at tey sleppa undan fyri einaferð skyld tá skattur skal leggjast á ella sparast skal.

Tað eru altíð tey lægstløntu í samfelagnum, sum tað gongur út yvir tá skattur skal leggjast á ella sparast skal.

Haldi ikki at tað kann vera nakar í hesum samfelagnum sum kann vera ósamdur í hesum her, tí tað eru okkara forfedrar sum hava skapt hetta góða samfelagið sum vit liva í og teir karmar sum vit hava at virka undir, og skulu vit vera takksom fyri, at vit kunnu nýta gott av tí.


VAL04

Um eg verið valdur inn í býráði, vil eg arbeiða fyri, at fáa gongd á hetta málið, um at kommunuskatturin skal vera progressivur, soleiðis at tær breiðastu herðarnar bera tær tyngstu byrðarnar.

# Klaksvík - tað nýggja Farum!

**Abraham Mikladal**


VAL04

Seinastu tíðina er komið undan kavi og staðfest, at tekniska umsitingini í Klaksvíkar kommunu er ódugandi (inkompetent), og at fleiri býráðslimir trívast væl við og beinleiðis stuðla uppundir óreglusemi og avmarkað lógloysi.

Soleiðis, sum gølurnar hava rullað og koma at rulla út yvir Klaksvíkar kommunu, er nærliggjandi at hugsa um stýring sum hana í Farum kommunu.

Lemjandi kritikkur er komin frá Innlendismálaráðnum til Klaksvíkar kommunu fyri beinleiðis ólógliga umsiting og viðtøkur í byggimáli. Somuleiðis gevur Løgtingsins umboðsmaður ilt av sær til Klaksvíkar kommunu fyri eitt líknandi byggimál, tó at hann fyrst og fremst vil hava Innlendismálaráðið at gera sítt eftirlitsarbeiði til lítar og seta kommununa uppá pláss.

Hetta eru bert tvey av mongum dømum. Higartil er staðfest, at umsitingin saman við býráðnum hevur:

- ikki hildið ásetingarnar í byggisamtyktini um grannahoyring í fleiri ár
- ikki hildið ásetingarnar í býarætlanini
- ikki søkt landsstýrið um loyvir til frávik í fleiri ár
- loyvt bygging, ið er beinleiðis í stríð við byggisamtyktina fyri býin, og hetta hevur staðið við í fleiri ár
- ikki dugað og kent byggisamtyktina nóg væl til at hava kunnað tikið rættar avgerðir
- givið ávísum borgarum betri sømdir enn øðrum (øll hava ikki verið eins fyri lógini)
- ikki hildið og virt lógina um alment innlit
- tilvitað ella ótilvitað hildið lógarkravdar upplýsingar aftur fyri Innlendismálaráðnum og Løgtingsins Umboðsmanni

og í nærmastu framtíð fara - heilt víst - fleiri onnur óreglulig viðurskifti at koma undan kavi.

**Fær ongar avleiðingar.**
Býráðslimirnir taka ikki hesar gølur og átalur í álvara. Hóast allar avdúkingarnar um óreglumsemi hevur byggifulltrúin onga nøs fingið alment. Sama kann sigast um leiðaran yvir honum, býarverk-frøðingin. Tað eru sostatt ongi stig tikin til at plasera ábyrgdina fyri hetta skipaða óreglusemið. Orsøkin er óivað, at fleiri av býráðslimunum eru partar í hesum arbeiðsháttinum og tí halda hondina yvir eini ódugandi tekniskari- / byggiumsiting.

**Nakrir býráðslimir trívast eftir øllum at døma í skipaðum óreglusemi.**
Alt bendir á, at ein partur av býráðslimunum trívist væl í einum avmarkaðum lógloysi. Á tann hátt fáa teir gjørt mun á fólki, soleiðis at teir kunnu tæna vinum og kenningum og vinna sær sjálvum fyrimunir. Hinvegin kunnu teir gera fólki, teir av eini ella aðrari orsøk ikki hava tokka til, ónáðir og "órætt".

Nevnast kunnu: Karl Heri Joensen, Kristian Fríðrik Olsen, Steinbjørn O. Jacobsen, Torleif Sigurðsson, Hilmar Danielsen, Erik Andreassen.

Hesir hava so - kosta, hvat ið kosta vil - atkvøtt fyri at ólógliga byggiloyvið við Garðavegin skal trýstast ígjøgnum, hóast staðiligar ávaringar og ráðgeving, bæði frá grannum og løgfrøðingi, um at tað er bæði ósømiligt og allarhelst eisini ólógligt at nýta slíkan framferðarhátt.

Tað er nærliggjandi at hugsa, at Karl Heri Joensen, form. í teknisku nevnd, ið er heitasti talsmaður fyri omanfyrinevnda framferðarhátti, hevur forlovað seg til byggiharran, sum er góður vinur, fyrrverandi samstarvsfelagi og stillari hansara til býráðsvalið. Málsviðgerðin hevur so ikki tolað dagsins ljós, tí hon er farin fram fyri afturlatnum hurðum.

**Tú kanst gera títt til at steðga óregluseminum.**
Sum borgari í Klaksvíkar kommunu kanst tú tann 9. november vera við til at broyta støðuna til tað betra. Far á val og vel aðrar óspiltar kreftir í býráðið. Tað finnast áhugaverd valevnir á øllum listunum, sum siga seg vilja stilla allar borgarar eins og arbeiða fyri meira kunning, opinleika og eini umsiting, ið er effektiv og rættvís.

## Gjald fyri valgreinar

Nú kommunuvalið er lýst, og fleiri vallistar eru almannakunngjørdir, fara vit eins og til undanfarin val at taka gjald fyri valgreinar. Gjaldið fyri valgreinar er hálvur lýsingaprísur.

**Sosialurin**

# Ellis- og røktarheimspláss

**Sámal í Gong**
*Valevni á lista H til býráðsvalið*


VAL04

Ellis, røktarpláss og umlætting eru átrokandi, tí má farast í gongd at útvega neyðturvuligu plássinibeinanvegin. Tað eru nógv eldri fólk i liggja heima sum hava akuttan tørv fyri hesum plássum.

Listi H vil seta pinku og ansingargjaldi niður til krónur 300,- pr. barn um mánaðin.

Í Havnar kommunu eru fleiri socialir trupulleikar, har ein patur er ógvuliga sjónligur. Hetta ætli eg at gerða naka alvorligt við.

Tilafturskomnu næmingar í fólkaskúlanum skulu fáa hjálp, ongantíð ov skjótt. Eykatímar til tey veiktlesandi máa fáast í rættlag. Eykajáttan til eykatímar vil eg arbeiða fyri so tað nøktar tørvin.

Grundstykkjatørvurin í Kollafyrði kann loysast beinanvegin, hetta verður gjørt í samráð við Kollfirðingar, so at tørvurin verður nøktaður.

Musikkskúlin skal stuðlast munandi, tí hesin hevur stóran týdning fyri ungdómin.

Listi H vil virka fyri at trætan millum Tórshavnar býráð og Starvsmannafelagið skal fáa eina skjóta og virðiliga loysn.

Fleiri bátapláss skulu útvegast í Havn, Kollafirði og Nólsoy, somuleiðis bátabrúgvar, verandi bátabrúgvar skulu kannast og umvælast.

Grundstykkjatørvurin í Havn kann loysast beinanvegin.

EG HAVI LOYSN INA - so allar umsóknir fáa eitt játtandi svar innan 4 mánaðar.

# Ein søgulig nýggjheit

**Sigurð S. Simonsen**
*Valevni á lista B*


VAL04

Á borgaralistunum A og B í Fuglafirði, ið samstarvaðust til seinasta kommunuval og eisini gera tað nú, eru allir tríggir fagfelagsformennirnir í býnum uppstillaðir.

Óli, Margretha og Jakku eru saman við reiðarum, stjórum, lærarum, lesandi, sosialráðgeva, grannskoðara, skúlavørði, smiðjum og øðrum góðum fólki til dystin fús.

Hetta má sigast at vera sera jaligt og heilt í tráð við slagorð borgaralistanna um, at í kommunalpolitikki eru vit "partapolitiskt óheftir".

Vit meina, at líka so neyðugt tað er við partapolitikki í landspolitikki, líka so óneyðugt er tað í kommunalpolitikki.

Nei, latið okkum standa saman sum ein maður/kvinna, líkamikið starvsheiti ella politiskan lit og gera okkara besta fyri at skapa góð livilíkindi og góðan trivnað fyri okkum í búleikast her í bygdunum Fuglafjørður, Kambsdalur og Hellurnar ið vit øll somul eru so sera góð við.